**sosialurin** telf. 11820 — giro 6282725
box 76, 3800 Tórshavn
Útgevari: Føroya Javnaðarflokkur
Blaðstjóri: Vilhelm Johannesen (ábyrgd) telf. 56411
Blaðmaður: Jan Müller
Prent: Dimmalætting

# For tilfældet

SEINASTU tíðina hevur rættuligt stríð verið um læknar og læknasetan við Suðuroyar Sjúkrahús. Vit fara ikki at endurtaka alla søguna, tá lesarar okkara uttan iva eru vitandi um gongdina í hesum máli.

MEN TAÐ seinasta í hesum máli er, at Ove Mikkelsen, løgtingsmaður nú krevur løgtingið saman at viðgera spurningin, og vil hann hava løgtingið at taka avgerð um, at tey lokalu sjúkrahústýrini sjálvi, eins og vanligt var undir gomlu lógini, skulu seta øll læknastørvini

TAÐ LØGNA við hesum er, at sum løgtingsmaður hevur Ove Mikkelsen sjálvur verið við til at viðgjørt og samtykt ta lógarbroyting, sum gevur landsstýrinum tann setandi mynduleikan, meðan sjúkrahústýrini bert skulu innstilla ímillum umsøkjarnar. Men nú, eftir at Ove Mikkelsen og aðir kenna seg at hava tapt í stríðnum um eitt yvirlæknastarv, skal løgtingið koma saman í úrtíð at broyta lógina.

OG ONGIN ivin er um, at hetta sjónarmið Ove Mikkelsen fær dygga undirtøku frá øllum fólkafloksmonnum í Suðuroy og eisini kring landið, tá hesir ikki vilja geva seg undir avgerð landsstýrisins, um at seta írska læknan í yvirlæknastarvið við Suðuroyar Sjúkrahús.

LAT OKKUM í hesum sambandi vísa á, at fyri stuttum gjørdi Klaksvíkar býráð av at broyta reglurnar fyri setan av størvum hjá Klaksvíkar kommunu. Broytingin er tann, at meðan býráðið sjálvt hevur sett øll størv higartil, skal býráðið fyri framtíðina bert seta tey leiðandi størvini, meðan nevndirnar hava fingið mynduleika til at seta hini størvini.

FÓLKAFLOKKURIN gekk í fyrsta lagi hart ímóti hesi broyting, tá uppskotið var til viðgerðar í býráðnum, og seinni hevur fólkafloksmaður í Klaksvíkar býráð klagað til landsstýrið, um hesa broyting, sum varð samtykt við atkvøðunum frá meirilutasamgonguni í býráðnum. Men sjálvandi hevði meirilutasamgongan tryggjað sær landsstýrisins góðkenning frammanundan.

TÁ NÚ MENN (Ove og fólkalfokksmenn) í Suðuroy fara at krevja setandi mynduleikan frá landsstýrinum og út til lokalu sjúkrahústýrini, so er hetta í tráð við nýggju mannagongdina í Klaksvíkar býráð, sum politiskt samsintir klaksvíkingar (fólkafloksmenn) hava gingið hart ímóti. Tann ynskta broytingin her, er bert meira viðgongd, tá hon eisini umfatar yvirlæknar, sum megu haldast at hava leiðandi størv.

HETTA ER bert eitt dømi um, hvussu ymiskt menn for tilfældet kunnu taka støðu til somu mál, ella mál av somu náttúru.

# dagbókin

**Guðstænasta**

Guðstænasta við altargangi verður í Havnar Kirkju við Eivind Vilhelm.

Í Kaldbaks kirkju hevur Hans J. Joensen guðstænastu.

**Lesarabrøv við dulnevndi ella merki**

Vit taka ikki móti slíkum brøvum uttan blaðið fær navnið á brævskrivaranum uppgivið.

Vit eru fegnir um at fáa lesarabrøv, og vit halda, at tað er bæði gott og beint, at fleir meiningar koma fram og at meiningar brótast.

Eisini er tað heldur ikki altíð lætt at seta sítt kristna navn undir lesarabræv, tí í okkara lítla landi verður tað tíverri ofta í einum tjaki ikki evnið, ið verður viðgjørt, men persónurin. — Blaðstjórin skal vita navnið á brævskrivaranum, annars endar brævið í pappírskurvini.

VESPA SCOOTARI
1 ára gamal til sølu.
Tlf. 13614

**ÍBÚÐ SØKIST**
til føroyska verkfrøðingarfamiliu við einum barni
**E. PHIL & Søn**
telf. 15400

## TØKK

Hervið takki eg øllum, sum tóku lut í stóru sorg okkara, tá ið maður mín

**POUL EDWARD PETERSEN**
fyrrverandi lærari


doyði og varð jarðaður.

**Elinborg Petersen**

## Vágafólk

Sýðsluskrivstovan í Sørvági er stongd fyrrapartin mánadagin 13. juni 1977. Frá kl. 14.00 sama dag verða tollur og onnur gjøld til landskassan avgreidd á nýggju gjaldstovudeildini í Sørvági

**Sýslumaðurin í Vágum**
9. juni 1977
M. av Kák




| Skip | Úr København | Úr Ålborg | Úr Halmstad | Úr Leith | Í Føroyum |
|---|---|---|---|---|---|
| BLIKUR | 9/6 | 7/6 | | | 13/6 |
| VELA | 16/6 | 14/6 | | 20/6 | |
| RAVNUR | | | 13/6 | 15/6 | |
| HEYKUR | | | 22/6 | | 26/6 |
| BLIKUR | 23/6 | 21/6 | | | 27/6 |

HEYKUR fermir í FRAMMEN 23/6

**PF SKIPAFELAGIÐ FØROYAR**

FILMAR — FILMAR — FILMAR — FILMAR — FILMAR — FILMAR —





Vit hava stórt úrval í 8 mm filmum.
Boksifilmar við Mohammed Ali — Foreman — Frazier o.fl.
Fótbóltsfilmar, nógv úrval.
Chaplin — Gøg og Gokke og fl.
Vit senda um alt landið.

**Fa. John S. Joensen**
Tlf. 55735
Klaksvík

FILMAR — FILMAR — FILMAR — FILMAR — FILMAR — FILMAR —